Televarpið
Fleiri rásir - einki roks

# VARPIÐ

Sosialurin




Canal+First • Mikudagin kl. 19.00

## Fuglarnir

Krossklipping, perspektivskift og tónleikur vórðu meistarliga nýtt, tá Alfred Hitchcock framleiddi ein av sínum avgjørdu klassikarum. Fuglarnir í einum litlum strandarbýi byrja brádliga at leypa á menniskju.



DR2 • Mánadagin kl. 19.50

## Hammer & Tickle

Eina ferð vóru nøkur lond, sum lógu langt burturi. Í hesum londum búðu fleiri hundrað fólk undir eini politiskari skipan, sum nú er horvin í mjørkanum. Skipanin kallaðist kommunisma, og har varð sagt, at alt beliv størri og betri við teirra skipan. Hatta við støddini passaði – bæði tí bíðirøðirnar við handlarnar longdust, tí talið av loyniløgreglumonnum øktist, og tað gjørdi talið av politiskum fangum eisini. Men eitt skulu kommunistarnir rósast fyri í hesum enska dokumentarfilminum. Teir dugdu serstakliga væl at gera gjøldur burtur úr síni egnu skipan.




SvF • Týsdagin kl. 19.00

## Fólkatingsvalið 2007

Útvarp og sjónvarp senda saman valkvøldið. Í sjónvarpsstovuni fylgja vertir og viðmerkjari við føroyska og danska valinum. Í kringvarpshøllini eru politikarar og aðrir gestir staddir, sum gera viðmerkingar bæði til útvarp og sjónvarp. Vit hava eisini fólk kring landið, sum fylgja við gongdini har. Alt kvøldið er eitt langt valkvøld og vit seta ikki punktum, fyrr enn endaligu úrslitini eru komin í hús.

**Fríggjadagur 9. november 2007**

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**